Handilsvinnufelagið

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Att.: Heilsu- og orkumálaráðið

Tórshavn 18. auguast, 2026

Áheitan til Heilsu- og orkumálaráiðið viðv. pantskipanini

Handilsvinnufelagið sendur við hesum skrivið eina áheitan á Heilsu- og orkumálaráðið um at fáa mvg-viðurskifti í lóggávuni rundaum pantskipanina í rætt lag áðrenn skipanin verður sett í gildi. Av tí at gildiskoman fyri skipanini er sett at verða 1. september 2026, so er átrokandi at fáa hesi viðurskifti í rætt lag skjótt.

Handilsvinnufelagið er gjørt varugt við, at meirvirðisgjaldi av panti nú skal fella í landskassan, tí panti av onkrari orsøk verður allýst sum eitt avgjald. Talan er í hesum føri ikki um rakstrargjaldi, sum framleiðarar og innflytarar gjalda, men sjálvt panti sum borgarin fær aftur tá eitt ílat verður lati innaftur.

Avbjóðing og skeivleikin í hesum er lýstur niðanfyri.

Pantskipanin er eitt umhvørvisátak og ikki ein inntøkukelda hjá landskassanum

Pantskipanirnar, sum tær virka í Føroyum í dag, verða handfarnar av privatu aktørunum, sum framleiða, innflyta og selja pantálagdar vørur. Skipanin virkar tí uttanum almenna uppíblanding. Í mun til pant, so er galdandi í dag, at ein borgari keypir eitt pantálagt ílat við t.d. 2 krónum eru í panti, sum er við mvg (1,60 kr. + 0,40 kr. í mvg). Tá borgarin letur ílati innaftur fær viðkomandi neyvt somu upphædd aftur, sum er 2 krónur. Goldna panti og endurrindaða panti ganga tí í null.

Tá pantskipanin nú verður fevnd av eini almennari skipan, so skilur Handilsvinnufelagið at mvg-parturin av pantinum nú skal fella í landskassan. Hetta tí at panti verður allýst sum eitt avgjald, sum handilsvinnufelagið heldur ikki skilur. Í hesum liggur, at tá sami borgarin sum omanfyri nú keypur eitt pantálagt ílat, so leggur viðkomandi 2 krónur í panti + 0,5 krónu í mvg út fyri pantílati, sum gevur 2,5 krónu. Tá borgarin kemur aftur við ílatinum endurrindar handilin honum 2 krónur aftur fyri panti, og fær borgarin tískil 0,5 krónu minni aftur fyri pantálagda ílati.

Grundleggjandi tankin við eini pantskipan hevur altíð verið miðsavna um umhvørvið og náttúruna, harundir at íløt, heldur enn at verða tveitt í náttúruna ella burturbeind saman við øðrum burturkasti, kunnu fáa nýtt lív í endurnýtslu. Handilsvinnufelagið skal tí staðiliga mótmæla, at skipanin nú skal skrúðast saman soleiðis, at hon eisini kastar fíggjarliga av sær til landskassan, sum borgarin, umframt at gera tí góðu ger at koma aftur við pantálagda ílatinum, skal gjalda fyri.

Handilsvinnufelagið heitir tí á Heilsu- og Orkumálaráðið um at fáa hesi viðurskifti í rætt lag, soleiðis at útgoldna panti og endurrindaða panti eisini frameftir gongur í null. Hetta kann gerast við at frítaka panti fyri mvg. Hetta tryggjar, at grundleggjandi tankin við einar slíkari skipan verður varðveittur – Eitt umhvørvisátak og ikki ein inntøkukelda hjá landskassanum. Sum eisini víst á omanfyri, so eru hetta viðurskifti, sum mugu fáast í rætt lag áðrenn skipanin verður sett í gildi.

Um tørvur er á at umrøða omanfyristandandi, so er Handilsvinnufelagið til reiðar at luttaka.

Vinarliga
Handilsvinnufelagið

Alvi Hjelm